# Urðardansur og barnatiltøk

í Kvívík 25. august 2007



**Tann vælumtókti urðardansurin verður við bátahylin í Kvívík tann 25. august.**

**Vit byrja dagin kl. 15:00 við tombola, fiskibrunnum, barnaróðuri (um viðrar), grønum pannikøkum v/litaðum róma, kaffi, ísi og pylsuvogni.**

**Kl. 18:00 verður barnadansur.**

**Kl. 21:00 er møguleiki at keypa grillaðar kjøtbúffar v/salati saman við hugnaligum tónleiki frá teimum vælumtóktu harmonikutónleikarunum í Kvívík, ið hita upp til dansin, sum byrjar kl. 22:00, har LM-BAND spælir (aldursmark: 14 ár).**

**Um viðrar koma motorsúkklur frá MC-felagnum til Kvívíkar kl. 16:00.**

## Komið til Kvívíkar og havið eitt gott og hugnaligt kvøld/nátt saman við okkum!

## KSR & Bygdarfelagið Glæman

---

**Mentamálaráðið**
Fólkaskúladeildin

# Einalærari í Kunoyar Skúla

**Tíðaravmarkað starv í Kunoyar skúla fyri einalærara í barnsburðarfarloyvi verður lýst leyst til setanar frá 3. september og í umleið 28 vikur.**

**Í Kunoyar skúla eru 6 næmingar í 1. – 7. flokki.**

**Um starvið**
Einalærarin undirvísir í øllum lærugreinum og hevur fyrisitingarligu ábyrgdina av skúlanum.

**Søkt verður eftir einalærara, sum**
- undir árbyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av dagligu undirvísingini
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- skal eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving. Um eingin lærari søkir starvið, verður fólk, ið ikki hevur fólkaskúlalærarútbúgving, sett í starvið.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við tænastu í Kunoyar Skúla.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 21.2 – 30.2.

Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 28. august 2007 kl. 12.00.

**Umsóknin verður stílað til**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við T-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.

---

**EL-SERVICE**

FO-480 Skála · Faroe Islands · www.el-service.fo
Tlf. 47 19 00 · Fax. 47 19 01 · el-service@el-service.fo

# Goymslulærlingur

Vit sóknast eftir goymlsulærlingi.

Eitt spennandi starv, har viðkomandi við tíðini sleppur at royna seg innan vørukeyp, ger av tilboðum og sum heild vera ein partur av dagliga arbeiðnum

**Uppgávurnar koma at fevna um:**
- Avgreiðslu av viðskiftafólki
- Røkt av goymsluni
- Bílegging av vøru
- Annað fyrifallandi arbeiði

Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur áhuga fyri el-arbeiði.

Um tú heldur, at hetta er nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn við møguligum viðmælum.

Hevur tú spurningar til starvið ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

Á El-Service arbeiða uml. 50 fólk, tey flestu hava el- og maskinútbúgving.

Vit arbeiða við framleiðslu, innstallatión, eldsløkkiútgerð og offshore.

Størsti parturin av okkara veitanum og framleiðslu fer til útflutnings.

Vit leggja stóran dent á góðsku og eru ISO-9001 góðkend.

---

## Eurest Føroyar søkir hjálparfólk til køkin á Føroya Tele

Søkt verður eftir hjálparfólki – helst einum fólki við royndum – til køkin hjá Føroya Tele at byrja sum skjótast.

Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag frá kl. 8.00 til kl. 16.00.

Áhugað fáa meira at vita við at ringja til Kristvin Jacobsen á telefon 225311, ella við at senda ein teldupost til kja@ft.fo.

Eurest
P/F Eurest Føroyar

*P/F Eurest Føroyar er eitt matveitingar- og reingerðarfelag, sum P/F Poul Hansen, heilsøla, í samstarvi við matveitingarfelagið Eurest Support Services A/S, hevur stovnað.*

---

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo